# Fýra kirkjuráð velja Føroya próst

**Tá ið nýggjur dómpróstur skal veljast fyri Bjarna Bæk, sum fer frá 31. januar, skulu kirkjuráðini í Suðurstreymar eystara prestagjaldi, ráðið fyri Dómkirkjuna, ráðið í Nólsoy, Kaldbak og í Hoyvík innstilla. Lógarverkið er afturút, og tí er ógreitt, hvør setanarmyndugleikin er**



*Bjarni Bæk, sum er 69 ára gamal, fer frá fyri aldur seinast í januar*

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Meira enn tvey ár eru liðin, síðan fólkakirkjan kom á føroyskar hendur, og framvegis haltar lógarverkið.

Tað hevur sín týdning, tá ið nýggjur dómpróstur skal veljast um nakrar mánaðir. Bjarni Bæk hevur biðið um at verða loystur úr embætinum 31. januar næsta ár, og bispur hevur játtað umbønini.

Men ongar reglur eru fyri, hvussu nýggju dómpróstur skal veljast, og hvør setanarmyndugleikin er, tí tað finst eingin lóg enn viðvíkjandi setan av nýggjum dómprósti.

Jógvan Fríðriksson, bispur hevur tí bara gjørt av, at kirkjuráðini í Suðurstreymar eystara prestagjaldi skulu innstilla. Nú eru kirkjuráðini trý, kirkjuráðið fyri Havnar kirkju, ráðið í Nólsoy og í Kaldbak. Á kirkjuráðsvalinum 3. november verður kirkjuráð á fyrsta sinni valt fyri Hoyvíkar kirkju, og tað verða sostatt bara hesi fýra kirkjuráðini, sum skulu innstilla. Hini kirkjuráðini í Føroyum verða ikki hoyrd, hóast dómprósturin er próstur fyri alt landið, tí dómprósturin er hálva tíð sóknarprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi.

Eftir at tey fýra kirkjuráðini hava innstillað, ger bispur sína innstilling til Mentamálaráðið, og hann er óheftur av hinum innstillingunum.

Ógreitt er, um setanarmyndugleikin verður Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentanarmálum, ella tað verður Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Jógvan Fríðriksson, bispur miðar eftir, at øll tey fyribils settu prestastørvini verða vald um sama mundið sum nýggi dómprósturin. Umframt fyribils settu størvini í Klaksvík, á Gjarðanesi og í Kvívík verður eisini eitt starv leyst í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Tað er eitt nýtt starv, sum bispur ikki hevur viljað lýst leyst, so leingi tað hava verið so nógv fyribils prestar. Men nú eru sáttmálaviðurskiftini við at koma í rættlag.

BYGMA BALSLEV

BYGMA BALSLEV SØKIR...

leiðara til Byggibúðina.

Byggibúðin hjá Bygma Balslev, ið er tann elsta í landinum, er nýliga ístandsett og dagførd, so tað er ein nýmótans handil, ið tú kemur at verða leiðari fyri.

Tú fært ábyrgdina av dagliga rakstrinum av Byggibúðini, og ein munandi partur av arbeiðinum verður at motivera starvsfólki, og geva íblástur soleiðis at Bygma Balslev heldur fast um leiðandi leiklutin á marknaðinum. Harumframt fært tú eisini ábyrgdina fyri marknaðarføringini av Bygma Balslev.

Tú mást vænta ymsar arbeiðstíðir og nakrar langar dagar av og á, og vit vænta at tú, við ágrýtni og góðum keypmansskapi, tryggjar framhaldandi framgongd.

Best er um tú hevur hóskandi leiðsluroyndir/útbúgving, og er stinn/ur í teldunýtslu.

Bygma Balslev kann bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum, og góðum umstøðum annars. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Ljóðar hetta áhugavert, so er at senda umsókn sum skjótast, og viðhefta avrit av møguligum prógvum og viðmælum.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinastalagi 28. september.

Nærri upplýsingar fáast við at tosa við Bent á Lava - bent@balslev.fo



Bygma Balslev • Vegurin Langi • 188 Hoyvík • tlf. 345000 • www.balslev.fo




Tú og e – vinna hvørja ferð!

ekortið er eitt MasterCard við innbygdum kreditti, sum kann brúkast um allan heimin. Við ekortinum vinnur tú pening fyri hvørt keyp. Hvørja ferð tú rindar við ekortinum í Føroyum, Danmark og Grønlandi, verður ein upphædd flutt á evinningskontu tína. Harafturat lata ekorthandlar í Føroyum eitt fast prosenttal í avsláttri. Í desember mánaða hvørt ár, fært tú uppsparda evinningin útgoldnan, og tá merkir tú veruliga fyrimunin við ekortinum!

Ert tú 18 ár, kanst tú søkja um ekort. Fyll út umsóknarblað á www.ekort.fo ella set teg í samband við ekort á tel. 348 348

Eik Banki P/F er ekortútgevari

www.ekort.fo